# 100 ára gamla søgan hjá okkara tjóðsangi

**2. jóladag 1907 varð okkara tjóðsangur framførdur fyrstu ferð alment. Miðvikan hevur hesa ferð alla søguna um lagið frá sjálvum tónasmiðinum, eins og hann greiðir frá øðrum løgum, hann hevur gjørt**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

*FF-blaðið kundi sum fyrsti fjølmiðil yvirhøvur greiða frá søguni um mest kenda lagið í landinum.*

*Blaðið hevði í 1999 eina greinarøð um Geilaættina og fekk tá loyvi frá ættini at endurgeva brot úr dagbókini hjá Petur Alberg. Millum hetta var hansara egna søga um lagið til tjóðsangin. Tað er ikki fyrr enn aftaná, at hetta er skrivað, at "Tú alfagra land mítt" gjørdist tjóðsangur. Tí er tað meira enn heppið fyri eftirtíðina, at Petur Alberg hevur skrivað søguna uttan at vita, at hetta skuldi gerast ein partur av Føroya søgu. Vert er eisini at geva gætur, at Petur Alberg bert var 22 ára gamal, tá ið hann gjørdi lagið.*

*Í samband við, at tað í komandi viku eru 100 ár liðin síðan hesa søguligu hending fara vit at endurprenta hesa frásøgn saman hansara frágreiðing um, tá ið hann gjørdi lagið til Tjaldurssangin, sum ikki hevur verið prentað fyrr.*

## Petur Alberg: Fyrsta lagið

Eitt tað fyrsta sanglagið eg gjørdi var "Mítt føðiland, tú ríkt ert fyri mær", sum Hans Andrias (Djurhuus), vinmaðurin í Áarstovu hevur yrkt. Lagið var tó ikki gjørt til henda sang men til St. St. Blichers: "Min Fødestavn er Lyngens brune Land". Tað var eitt kvøld í februar (eg hugsi 27.) í 1903, at eg gjørdi hetta lagið uppi í tí gamla kamarinum uppi yvir køkinum í Geil. Antin sama kvøldið, ella stutt aftaná, fór eg heim í Áarstovu til Hans Andrias, har eg støðugt gekk og vitjaði skaldið í "smiðjuni", sum vit kallaðu kamarið, hann svav í, læs í og smíðaði allar sínar yrkingar í. Kamarsvindeygað vendi eystureftir, út á "grundina" út móti Álarholi og "Handilsforeingini", og her hoyrdist inn sjóðið av ánni, sum var frálíka inspirerandi, segði Hans Andrias. Borðið stóð í krókinum við vindeygað, og millum borðið og bíleggarovnin stóð ein stólur, har skaldsins gestir plagdu at sita. Á hesum stóli sat eg manga kvøldarløtuna og lýddi á nýsmíðaðar yrkingar, sum skaldið las upp fyri mær. Her sat eg og sang hetta lagið, eg hevði komponerað. Hans Andriasi dámdi tað ógvuliga væl, og nakrar dagar aftaná sá "Mítt føðiland" dagsins ljós í rímsmiðjuni í Áarstovu.

Sangurin var tó lítið og einki kendur í eini 2-3 ár. So í 1906 gav Jógvan Waagstein út "Songbók Føroya Skúla", har kom eisini hesin sangur uppí. Við bókini fylgdi eitt hefti við løgum (nótum), og ikki tordi eg at seta mítt navn uppi yvir lagnum. Eg lat hann seta A. Berg, so sá tað út, sum lagið var danskt. Eg var bangin fyri, at fólk fóru at flenna at mær, at eg var so frekur at royna at komponera. Bókin kom út, men lagið var tó ikki nógv kent ta fyrstu tíðina.

Um nýár 1907 byrjaðu vit so aftur sangfelag. Tað hevði tá sovið eini tvey ár. 7. apríl høvdu vit konsert (Johan Restorff dirigeraði fyrstu ferð), og millum sangirnar vóru eisini 4 føroyskir, tó ikki við nýggjum løgum. Tað summarið hvíldi so sangfelagið og ætlanin var at hava konsert aftur til jólar.



*Petur Alberg og Óla Jákup í Horni vóru vóru bestu vinmenn. Her eru teir ungir, og man hetta vera um tíðina, tá ið Petur smíðaði okkara best kenda lag*



*Hetta er fyrsta kladdan til lagið "Tú alfagra land mítt". Petur hevur tó tilskilað í 1930: Hann er soleiðis enn. Eisini hevur hann tilskilað: Smíðaður 4. September 07 á "ovasta lofti" í Geil*

## Løgtingsmenn sum "próvdómarar"

Í løgtingstíðini 1907 gingu javnan ymsir sjálvstýrisløgtingsmenn, Símun av Skarði, Rasmus Rasmussen, Símun P úr Konoy og M.A. Winther, inn í Geil um kvøldarnar mest at vitja Kristin bróður og práta um "politiskar og socialistiskar materiur", sum Gudbrandur sigur í "Hjá dalabóndum". Í teimum síðstu árunum frammanundan vóru nógvir vakrir føroyskir sangir yrktir við ongum lagi. Millum annað hevði Hans Andrias, meðan hann var læravikarur norðuri í Vági (1905-06), yrkt ein dikt-cyklus "Ást og